# Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Hvassur vindur av eystri og regn, seinnapartin strúkur í vindi av vestri og ælingur. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Strúkur í vindi av útnyrðingi, seinni stívt andøvsgul av ymsum ættum. Regn ella vátaslettingur av og á og hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hvassur vindur av útsynningi, seinni skrið av útnyrðingi. Ælingur og hitin millum 2 og 5 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Hann minkar vindin niður í stívt andøvsgul av útnyrðingi og okkurt kavaælið. Hitin um frostmarkið. Seinni lækkar hann niður í útsynning og tað fer at regna. Hitin kemur upp í eini 5 stig.



*Ein føroyingur í Esbjerg stjelur bilar í Danmak og selur teir til Føroya. Hann er nú tikin skuldsettur fyri stuldur*

**Mynd: Álvur Haraldsen**

# Føroyar marknaður fyri stolnum bilum

*Fleiri bilar, ið eru stolnir í Danmark, eru seinastu tíðina seldir í Føroyum við følskum stellnummari*

JOHN JOHANNESSEN

Brúktir jeppar av slagnum Nissan Patrol og Toyota Land Cruiser við einum virði á umleið 100.000 krónur eru seinastu tíðina seldir í Føroyum fyri helmingin av virðinum.

Orsøkin til lágu prísirnar hevur verið, at talan er um stolnar bilar úr Danmark, sum eru fluttir til Føroya undir følskum stellmerki.

Kriminalløgreglan í Føroyum sigur seg vita um fýra stolnar bilar, ið seinastu tíðina eru seldir í Føroyum. Men hon útihýsir kortini ikki, at talan er um fleiri bilar.

**Skifta typuplátur**

Bergleif Brimvík, kriminalløgregluovasti, sigur, at talan er um ein føroying í Esbjerg, ið hevur stolið bilarnar í Danmark og selt teir til Føroya.

Maðurin hevur samstarvað við ein føroying her heima, sum hevur tikið typuplátur av burturbeindum bilum í Føroyum og sent føroyinginum í Esbjerg tær. Hesin hevur so sett typupláturnar á bilarnar, hann hevur stolið, samstundis sum hann eisini hevur høgt nýtt stellnummar í stolnu bilarnar.

Grovasta dømið um slíkan bilstuldur fekk føroyska kriminalløgreglan fyri knøppum ári síðani, tá sami maður royndi at selja ein lastbil við einum virði á umleið eina millión fyri 500.000 krónur. Tá varð farið fram á sama hátt, men eisini tá fekk løgreglan illgruna orsakað av lága søluprísinum.

**Skerpt eftirlitið**

Løgreglan, Bileftirlitið og tollvaldið hava nú skerpt eftirlitið soleiðis, at tað ikki longur skal bera eins væl til at flyta inn bilar við følskum stellnummari og følskum typuplátum.

Kriminalløgregluovastin, Bergleif Brimvík, sigur, at tollvaldið og Bileftirlitið nú hyggja serstakliga væl at stell- og motornumrum, tá bilar verða innfluttir, og tá bilar eru til sýn. Hetta, heldur hann, fer at avdúka, um tað eru fleiri, ið stjala bilar uttanlands og selja teir í Føroyum.

Maðurin, ið hevur stolið bilarnar og selt teir higar, er tikin og skuldsettur fyri stuldur. Málið kemur fyri í rættinum í Esbjerg í næstum.




Ein hátrýstryggur yvir Føroyum fer eystureftir og lágtrýstið í landsynning úr Hvarvinum fer í landnyrðing.




Lágtrýstið við Føroyar fer spakuliga eystureftir, men fríggjanáttina nærkast eitt nýtt, djúpt lágtrýst Føroyum við vindi og regni.




**Hitalagið mált frá 06./03. kl 06[00]–07./03. kl 06[00]. Hitin í gjár: 1,1°C**
Minsti hiti máldur í mars: **÷8,7°** Mesti hiti máldur í mars: **12,0°**




Avfallið: 0,0 mm – **mált frá 06./03. kl 6[00]–07./03. kl 06[00]**
Avfallið higartil í mars: 36,1 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷19 |
| Nuuk | ÷9 |
| Qaqortoq | ÷5 |
| Ammassalik | ÷10 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | ÷1 |
| Seyðisfjørður | ÷3 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 12 |
| Tromsø | ÷6 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannahavn | 3 |
| Helsinki | 2 |
| Moskva | ÷2 |
| Berlin | 9 |
| Warzawa | 6 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 2 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 16 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 9 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 6 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | – |
| New York | 10 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 11 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 30 |
| La Paz | 18 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 28 |







TURRIKLÆÐI, HÚGVUR, T-SHIRT, KEPPAR og FLØGG



12. MAÐUR
Tlf. 213212

## Vestfalskyrrindi

6. mars: Tendring
13. mars: Fyrra kvarter
15. mars: Mánin næstur jørðini

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmanna-sundi fp | sp | Mykines-firði fp | sp | Nólsoyar-firði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvanna-sundi fp | sp | Fugloyar-firði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8. mar | 7:42 | 19:59 | 6:42 | 18:59 | 6:57 | 19:14 | 9:42 | 21:59 | 10:42 | 22:59 | 5:57 | 18:14 | 4:57 | 17:14 | 7:57 | 20:14 | 8:57 | 21:14 | 7:27 | 19:44 | 8:42 | 20:59 |
| 9. mar | 8:16 | 20:34 | 7:16 | 19:34 | 7:31 | 19:49 | 10:16 | 22:34 | 11:16 | 23:34 | 6:31 | 18:49 | 5:31 | 17:49 | 8:31 | 20:49 | 9:31 | 21:49 | 8:01 | 20:19 | 9:16 | 21:34 |
| 10. mar | 8:52 | 21:11 | 7:52 | 20:11 | 8:07 | 20:26 | 10:52 | 23:11 | 11:52 | — | 7:07 | 19:26 | 6:07 | 18:26 | 9:07 | 21:26 | 10:07 | 22:26 | 8:37 | 20:56 | 9:52 | 22:11 |
| 11. mar | 9:32 | 21:56 | 8:32 | 20:56 | 8:47 | 21:11 | 11:32 | 23:56 | 0:11 | 12:32 | 7:47 | 20:11 | 6:47 | 19:11 | 9:47 | 22:11 | 10:47 | 23:11 | 9:17 | 21:41 | 10:32 | 22:56 |

Kelda: Skipalistin 2000